# Miðnámsskúlin

KIRSTEN BRIX



Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur sett sær fyri at seta eina nýggja miðnámsskúlaskipan í verk frá august 2007, t.e. um eitt ár.

**Nýggj skipan**

Fyri umleið einum hálvum ári síðani setti landsstýrismaðurin eina nevnd mannaða við trimum umboðum frá mentamálaráðnum og skúlastjórunum/rektarunum í miðnámsskúlunum, tilsamans átta limum, at greina verandi skipan og at koma við tilmæli til eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu tær gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar skulu skipast í framtíðini. Afturat nevndini varð settur ein sonevndur tilvísingarbólkur, sum umframt formann og skrivara hevur tólv limir umboðandi yrkisfeløgini hjá lærarunum, næmingar, Fróðskaparsetrið, skúlarnar og Vinnuhúsið.

**Verandi skipan**

Sum er, hava vit eina skipan á miðnámsøkinum, sum fevnir um studentaskúla, HF, HIF (í fiskivinnuskúlanum), HH (í handilsskúlanum) og HT (í tekniska skúla), við øðrum orðum eru tvær alment gymnasialar og tríggjar yrkisgymnasialar útbúgvingar.

**Viðgerð**

Ein stórur partur av ungdóminum gongur styttri ella longri tíð á einum ella fleiri av hesum skúlunum. Broytingarnar, sum mentamálaráðharrin hevur stungið út í kortið, verða tí sera avgerandi fyri ein stóran part av fólkinum. Tí kann tað undra, at so lítið ítøkiligt hevur verið at hoyrt alment um, hvat ætlanin er, og hvørjar hugsanir hon byggir á.

Á heimasíðuni hjá MMR ber til at lesa arbeiðssetningin hjá nevndini, sum skal tilevna uppskotið um nýggjan bygnað. Tilmælið hjá nevndini skal vera liðugt 23. januar 2007, í januar/februar verður aðalorðaskifti í løgtinginum, og skipanin verður sett í verk frá august komandi ár. Tað er neyðugt støðugt at dagføra skipanir á skúlaøkinum, eingin ivi um tað. Men fyri at tryggja at broytingarnar verða til tað betra, er umráðandi, at t.d. lærarar á økinum eru við í tilgongdini. Tað er ikki seriøst at fara undir so stórar broytingar, sum talan her er um, uttan frammanundan gjølla at hava kannað tað kvalitativa innihaldið í útbúgvingunum.

**Bygnaður**

Eftir tí nýggju ætlanini skulu allar miðnámsútbúgvingar skipast eftir sama leisti. Tær taka trý ár, byrja við einum felags støðisári og halda fram tvey ár á ymiskum breytum. Støðisárið endar við próvtøku á c-stigi í ymiskum lærugreinum. Til ber at steðga á eftir lokið støðisár, tó at meginreglan eigur at vera, at næmingurin heldur fram og tekur fult prógv.

Henda skipanin er í dag galdandi í Handilsskúlanum (FHS+HH), Tekniska skúla (SIT+HT) og Fiskivinnuskúlanum (SIF+HIF). Í Studentaskúlanum er eitt samanhangandi 3 ára nám umframt HF, sum tekur tvey ár.

**Støðisár**

Eitt endamál við felags støðisári er, at allir næmingar skulu fáa eitt felags grundarlag, og at tað skal gerast lættari enn í dag at skifta breyt. Tá ið næmingar hava gingið 9 ella 10 ár í fólkaskúla, hava tey so ikki eitt felags grundarlag? Eru tey ikki komin hartil, at tey gleða seg at sleppa at velja ta leiðina, sum hugurin stendur til? Umleið 60% av einum árgangi fara undir miðnámslestur. Tey hava hvørki sama áhuga ella somu førleikar at læra. Sum er, kunnu tey velja millum eitt alment ella eitt yrkismiðnám. Lærugreinirnar í studentaskúlunum eru teoretiskar og alment búgvandi. Í yrkisskúlunum eru harumframt lærugreinir, sum peika beinleiðis fram móti ymiskum vinnugreinum. Skúlarnir hava hvør sítt eyðkenni, ikki bara á pappírinum, men eisini í verki. Tað er ein styrki, og tað er sera vandamikið at undirmeta týdningin av hesum.

Tað hevur ofta verið ført fram, at talan er um parallelskipanir, sum eru óneyðugar í einum so lítlum samfelagi sum okkara. Eftir mínum tykki er hetta ikki rætt. Í einum lítlum samfelagi er brúk fyri líka nógvum funktiónum sum í einum stórum. Tað er neyðugt at útbúgva fólk við atliti at øllum táttum í samfelagnum, og tí eigur tað valið, næmingarnir gera, at síggjast aftur í innihaldinum í undirvísingini frá fyrsta degi. Fyrr farið verður til verka, dygdarbetri verður úrslitið.

**Støði**

Á øllum miðnámsútbúgvingunum eru lærugreinirnar á A-, B- ella C-støði. Tað verður av summum tulkað soleiðis, at so eru innihaldið og støðið eisini tað sama. Men so er ikki. Tað sigur seg sjálvt, at studentaskúlarnir, í t.d. føroyskum og við hægri tímatali og við fleiri ástøðiligum lærugreinum sum stuðli, eiga at vinna upp á eitt hægri støði enn yrkisskúlarnir og HF. Gera teir ikki tað, gera lærararnir ikki sítt arbeiði nóg væl. A-støði í føroyskum er tí ikki tað sama í teimum ymisku miðnámsskúlunum. Tað sama er galdandi í støddfrøði og øðrum ástøðiligum lærugreinum við. Tað er ikki góður tóni at siga so, tað veit eg. Men eg haldi, vit eiga at síggja hetta øðrvísi.

Næmingar, sum hava staðið próvtøku í einum miðnámsskúla, hava somu møguleikar at sleppa inn á allar hægri lærustovnar. Sum Handilsskúlin einaferð lýsti við, so ber væl til at lesa til prest við HH-prógvi í hondini. Ja, men tað skal skiljast á ein ávísan hátt. Tað ber væl til at lesa til prest við HH- ella HIF-prógvi. Tað ber væl til at lesa til lækna sum nýmálsligur studentur. Tað ber væl til at lesa til jurist við HF-prógvi. Tað ber væl til at lesa til grannskoðara við HT-prógvi. O.s.fr. Men tað er bara ikki tann beina leiðin. Tann, sum velur soleiðis, veit, at hann ella hon fær kjansin, men at tað kostar eyka arbeiði sum t.d. ískoytisskeið av ymiskum slagi. Men hann/hon er motiverað, tí ber tað til. Og tað er gott, at okkara skipan er so liðilig. Men fyri tey flestu hevur tað týdning, hvussu tey velja frá byrjan. Vilt tú lesa støddfrøði, er tað skilagott at fara í studentaskúla. Vilt tú lesa til búskaparfrøðing, er mest upplagt at velja Handilsskúlan. Vilt tú vera fiskifrøðingur, vel tá Fiskivinnuskúlan. O.s.fr. Altso: A-støði í teimum ymisku miðnámsskúlunum er ikki tað sama, men skipanin er soleiðis gjørd, at ein næmingur við einum A-støði í hondini hevur atgongd til hægri útbúgvingarstovnar.

Hetta merkir væl at merkja ikki, at ein skúli er betri enn nakar av hinum. Tað merkir heilt einfalt, at skúlarnir hava sína styrki á ymiskum økjum, og tað kann ikki virðismetast nóg høgt. Hvør skúli sær hevur tað hægsta støðið á sínum øki, tí lærugreinirnar tilsamans stuðla upp undir tann ávísa profilin, og tí byrjað verður beinanvegin við tí, sum er relevant. Fara vit nú at taka munin burtur, er vandi á ferð. Eitt støðisár fer at seinka progressiónina, tí øll læra nú einaferð ikki alt líka væl. Og hví skulu tey eisini tað?

**Depil**

Nú í vár hevur løgtingið viðtikið, at skúladepil verður bygdur í Marknagili í Havn. Tað er ætlanin, at allir miðnámsskúlar eftirhondini skulu húsast har, hóast Studentaskúlin ikki verður við í fyrstu atløgu. Sagt verður frá ymiskari politiskari síðu, at skúlarnir eru ov smáir hvør sær, og at meiri fæst burturúr, um skúlarnir allir eru undir sama taki. Eg ivist stórliga. Studentaskúlin í Hoydølum er ikki nakar lítil skúli. Eisini eftir norðurlendskum málistokki er ein skúli við uml. 550 næmingum og uml. 65 lærarum ein rímiliga stórur skúli. Hann kann bjóða eitt breitt úrval av vallærugreinum á bæði A- og B-støði.

Eg havi ikki enn sæð nakra fakliga-pedagogiska grundgeving fyri, at depilsloysnin skal vera ein fyrimunur. Tvørturímóti fer ein samanlegging eftir míni sannføring at hótta tað fakliga støðið, sum Studentaskúlin bjóðar í dag. Enn einaferð skal eg leggja dent á, at hetta ikki skal skiljast soleiðis, at vit í Studentaskúlanum eru betri enn onnur. Men vit eru vónandi tey bestu til tað, sum vit gera. Fyrr var illa. Vit eru góð við okkara skúla, og vit hava ambitiónir vegna okkara næmingar. Sum hinir lærararnir hava tað á sínum skúlum, rokni eg við.

**Broytingar**

Tað, sum her er sagt, merkir ikki, at broytingar ikki skulu fremjast. Tað merkir heldur ikki, at lærararnir í Hoydølum eru ímóti broytingum, soleiðis sum ført hevur verið fram. Í roynd og veru er innihaldið í undirvísingini í støðugari broyting, tað vil so vera. Høvdu vit ikki dugað at fylgt við og lagað okkum eftir skiftandi rákum, høvdu næmingarnir ivaleyst valt aðrar leiðir. Vit vilja fegin samstarva, og vit eru fús at bretta upp um armar.

**10. flokkur**

Fólkaskúlin hevur svárar trupulleikar at fáast við. Við alt ov smáum játtanum skulu lærararnir fáa allar næmingar ígjøgnum eina skipan, sum í prinsippinum er á einum rættiliga høgum støði. Men at næmingarnir eru so ymiskir, sum teir eru í tí veruliga lívinum, er ikki lagt upp fyri í gerandisdegnum. Tí fáa m.a. teir næmingarnir, sum ástøðiliga eru best fyri, og sum hava hug tann vegin, ikki nóg nógvar avbjóðingar. Latið teir/tær sleppa at velja tann ástøðiliga vegin, og latið miðnámsskúlan sleppa at bjóða teimum krøv, sum kunnu flyta teir/tær, í staðin fyri at noyðast at draga teir/tær gjøgnum eitt 11. felagsár.

Heldur enn at seta á stovn eitt støðisár í miðnámsskúlunum kundi eitt uppskot verið at latið 10. flokk verið støðisár. 10. flokkur kundi verið skipaður soleiðis, at næmingarnir sluppu at velja breytir, sum fyrireikaðu teir/tær til krøvini, sum teir einstøku skúlarnir settu. Eisini kundu breytir verið skipaðir fyri teir næmingar, sum ætla sær eina handverksútbúgving. Hvussu tað ítøkiliga kundi verið skipað, havi eg ikki fortreytir fyri at siga. Men við einari slíkari skipan kundi 10. flokkur verið tann mondul, sum knýtti fólkaskúla, miðnámsskúla og handverksútbúgvingar saman.

**Keldur:**
Álitið "Endurskoðan av gymnasialu útbúgvingunum" (2004).
"Ávegis arbeiðsskjal", sum sitandi nevnd hevur skrivað.
www.mmr.fo
Aðrar útbúgvingar > Endurskoðan av gymnasialu útbúgvingunum

# Bilverjur eiga at verða gjørdar í øllum tunlum



*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Bilverjur eiga at verða gjørdar í øllum tunlum í Føroyum, eins og bilverjur eisini eiga at verða gjørdar framvið øllum vegum, har tað er neyðugt!

Ein hin kendasta ferðsluvanlukkan í tunli man vera tann við Dianu prinsessu. Bilurin, hon var í, rendi í eina súlu, sum stóð í vegjaðaranum. Hevði bilverja verið í tunlinum, hevði tann vanlukkan helst ikki verið so álvarlig.

Veggirnir í tunlunum í Føroyum eru ikki sléttir. Fer ein bilur av einhvørjari orsøk av kós og rennur í veggin, kann hann verða "hangandi" og stoyturin kann gerast ógvusligur. Ein vanlig bilverja kann fyribyrgja hesum.

Nullhugsjónin er nú samtykt í løgtinginum, men skal tað málið náast er alneyðugt at vit gera eina Landsvirkisætlan um ferðslutrygd í Føroyum.

Men vit hava enn onga Landsvirkisætlan um ferðslutrygd í Føroyum, og tískil er ikki nøkur miðvís ætlan, sæð út frá einum ferðslutrygdarsjónarmiði, løgd enn. Um vit høvdu eina Landsvirkisætlan um ferðslutrygd, hevði ein ætlan um bilverjur verið ein natúrligur partur av henni

Ferðsluvanlukkur raka land okkara meint, og ferðsluskaðar kosta Føroyum milliónir krónur árliga.